AGANEVNDIN

**KÆRA 8/2012**

| | |
|---|---|
| ***FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
| **Málsheitið: Víkingur kærir FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 1. deild kvinnur | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 20.05.2012 | Aganevndin móttikið kæru: 7. juni 2012 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

Víkingur hevur kært FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum Víking og FC Suðuroy tann 20. mai 2012 í 1. deild Kvinnur.

Í kæruni vísir Víkingur á, at FC Suðuroy hevur nýtt tveir ólógligar leikarar í dystinum tann 20. mai 2012 og at talan er um leikararnar Eyðvør Jacobsen og Eyð T. Magnussen.

FC Suðuroy er hoyrt í málinum og vísir á, at annar leikarin orsakað av misskiljing ikki er skrásettur hjá FC Suðuroy og at hin leikarin var skrásettur hjá Sumba, og síðani tað felagið varð niðurlagt, hevur leikarin ikki leikt fótbólt.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 20. mai 2012 varð dystur leiktur millum Víking og FC Suðuroy 1. deild Kvinnur.

Sambært dómaraseðlinum leiktu Eyðvør Jacobsen og Eyð T. Magnussen fyri FC Suðuroy.

Sambært upplýsingum frá FSF skrivstovuni eru hesir báðir leikarir ikki skrásettir hjá FC Suðuroy.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin staðfestir, at leikararnir Eyðvør Jacobsen og Eyð T. Magnussen, sum leiktu fyri FC Suðuroy í nevnda dysti, ikki vóru skrásettar sum lógligir leikarar hjá felagnum.

**6. Niðurstøða**

Leikararnir Eyðvør Jacobsen og Eyð T. Magnussen leiktu ólógliga í dystinum millum Víking og FC Suðuroy tann 20. mai 2012 í 1. deild kvinnur, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður FC Suðuroy 1. deild kvinnur dømt at tapa dystin móti Víkingi tann 20. mai 2012 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 20. juni 2012**

Ingunn Ó. Eiríksdóttir, forkvinna